Góða nátt, Vágar!

SOFUS Í HORNI HANSEN

Viðmerking til Regin Jespersen

Lat meg byrja við at siga, at eg í samrøðuni við útvarpið klárt segði, at eg hevði alla virðing fyri tí arbeiði, løgreglan hevur gjørt í Vágum. Eg eri somuleiðis sera keddur av at hoyra, at Regin Jespersen hevur havt slíkar keðiligar og skakandi upplivingar, sum eingin átti at verið noyddur at upplivað. Men høvdu umstøðurnar verið øðrvísi, so kundi hent, at Regin ongantíð upplivdi hesa skakandi hending. Hevði drongurin havt koyriførleika og lært virðing frá tí hann var 8 - 10 ára gamal undir vardum umstøðum, so kanska hetta ongantíð var hent! Uttan koyriførleika kundi hann møguliga eisini havt livað til hann kundi keypa sær ein bil við 500HK og koyrt seg í rot við honum! Úrslitið uttan frálæru kundi komið seinni, men úrslitið hevði verið tað sama.

At eg verji lógloysi í Vágum ella elvi til uppreistur er so óluksáliga langt úti, at eg ikki tími at gera eina einastu viðmerking til Sonna Jacobsen uttan hana, at hann í grein síni júst lýsir, hvussu forferdilig støðan er - nakað, sum vit heilt kundu havt sloppið undan, um onkur hevði tikið sær av hesum drongjunum, meðan tíð var, og áðrenn tað gekk galið.

Og so er tað sjálvandi ótrúliga spell, at prutlini oyðileggja honum náttarsvøvnin - Gud viti, hvussu hann fær sovið, tá vøllurin er longdur og verður opin alt samdøgrið! Ørgamaðurin má fáa sær sterkari gløs í brillurnar, so hann dugir at lesa - eisini tað, sum stendur millum reglurnar!

Spurningur mín stendur framvegis í leysum lofti: Er problemið nú loyst? Og ætlar nakar at gera nakað sum helst? Regin Jespersen gevur mær rætt allan vegin um vantandi uppalingina av ungu monnunum. Tað gleðir meg at hoyra, at talan yvirhøvur er um friðarligar drongir, men tit hava altso bara fjernað nøkur symptom, ikki orsøkirnar.

Regin ger sær enntá tann ómak at lýsa, hvussu nógv er bygt til bóltarnar har vesturi og hvussu lítið skal til fyri at gera eina breyt til drongirnar, og hvussu vælegnað umhvørvið er. At tað ikki glógvar í einum einasta kommunalpolitikkara er tá heilt fantastiskt. Skoytir eingin um komandi atkvøðurnar frá hesum ungu monnunum? Skulu vit uppfinna eitt bilbóltspæl, fyri at fáa tykkum at vakna?

Tit brokka tykkum um ferðsluskaðar og tragediur. Men at økja um koyriførleikan hjá ungum fólki, tað ber ikki til. Men fótbóltsvallir við øllum tilhoyrandi hentleikum fyri hvørjar 10 mans, uppgraderaðar við nýggjum grasi við jøvnum millumbili fyri fleiri miljónir, tað hava vit ráð til. Eina lítla koyritekniska breyt fyri at spara nøkur mannalív, nei, tað hava vit als ikki ráð til.

Sera skemtiligt kortini at hoyra Regin gremja seg um, at hann er tikin við berari reyv av útvarpinum undir brúsuni í 'úrtíð' - klokkan hálvgun níggju um morgunin. Og hin viðmerkjarin fær ikki sovið, stakkalin. Kanska vit bara skuldu flutt flogvøllin suður til Havnar og gjørt eina koyritekniska breyt her suðuri, so tit fáa frið at sova víðari.

Eg tími ikki at gera fleiri viðmerkingar í hesum umfari. Nú fari eg at tosa við onkur skilafólk um at gera eina koyribreyt.

Góða nátt.

ES!
Fyri at økja um skipatrygdina er útbúgvingin hjá yvirmonnunum betrað og uppgraderað. Fyri at økja um flogtrygdina er útbúgvingin hjá flogskiparunum betrað og uppgraderað. Bussførarar skulu nú heilsukannast oftari og fleiri ferðir á skeið. Men okkara prutlførarar verða framvegis sleptir út í ferðsluna uttan koyriførleika. Hví er tað ikki eitt problem?

Sofus við eini plakat við mynd av Porsche bilinum hjá honum, sum var við á eini framsýning í Stokholm í fjor

Sitandi samgonga ein vandamikil cocktail

JOHAN DAHL
løgtingsmaður

Ársgongur	1992	1993	1994	1995	1996	1997	1998	1999	2000	2001	2002	2003	2004	2005	2006	2007,2
Inntøkur tilsamans	2.527	2.502	2.585	2.734	2.755	2.968	4.135	3.470	3.575	3.931	3.773	3.884	3.947	3.986	4.089	4.845
Skattur	916	899	789	858	827	938	1.045	1.239	1.309	1.667	1.679	1.989	1.936	1.928	1.676	1.731
Avgjald o.a.	794	733	947	966	965	850	1.240	1.157	1.117	1.148	1.239	1.274	1.239	1.333	1.039	1.857
Rentur	36	51	35	50	61	54	35	46	50	110	126	72	53	46	41	53
Avlop frá Tjóðbankanum	31	44	5	27	28	24	21	21	28	21	32	28	33	33	18	23
Heildarveiting o.a.	755	914	917	952	907	896	920	945	913	995	929	833	933	931	832	829
Aðrar inntøkur	8	5	4	7	0	36	142	117	85	50	58	81	41	67	120	88
Samlagt inntøkur	0	0	0	0	0	0	500	0	0	0	0	0	0	0	532	969
Útreiðslur tilsamans	3.428	3.036	2.975	2.897	2.879	2.798	2.794	2.822	2.873	3.234	3.582	3.442	3.699	3.836	3.096	4.095
Rekstur, stuðul o.a.	2.487	2.333	2.174	2.131	2.170	2.259	2.335	2.453	2.589	2.949	3.147	3.192	3.334	3.487	3.579	3.738
Løgur	244	167	127	71	72	75	100	146	114	192	240	252	228	201	208	261
Rentur	257	328	445	466	438	414	329	323	313	308	188	188	147	158	80	68
Samlagt útreiðslur	450	2.200	234	199	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0
MLD 1	-447	-534	-116	96	79	170	471	648	703	697	196	22	-152	-210	141	65
MLD 2	-901	2.034	-346	-153	79	170	1.271	648	703	697	196	22	-152	-210	673	843

Høgni Hoydal førir áhaldandi fram, at undanfarna samgonga við sínum skattalættum var ábyrgdarleys.

Hetta er sjálvandi tað sum man kallar "politiskt spinn", og tað er Høgni góður til.

Svullurin sum Høgni hevur so ilt av íkom í 1998 og hevur nú vaksið seg búnan til at bresta á tann sum var við til at íbirta hann.

Ótálmaði útreiðsluvøksturin og skerjing av fruminntøkum okkara, sum fullveldissamgongan legði lunnar undir, er nú við at merkjast, nú niðurgongd er í vinnuni, og búskapurin, sum síðan 1997 hevur verið fyri eksplosivari framgongd, nú er við at kølna.

Niðanfyri nevnda yvirlit vísir, hvussu útreiðslurnar vuksu frá 1992-2008 - legg til merkis, hvar stóra skriðan leyp bæði á útreiðslu- og inntøkusíðu landskassans. *Sí talvu*

Fullveveldis samgongan sum nú finst at okkara skattalætta, gav skattalættar fyri útvið 300 milliónum í bestu tíðum nakrantíð, men hóast skattalættarnar so øktist skattatrýstið við umleið 3,8% í sama tíðarskeiði orsakað av, at skattastigin ikki bleiv tillagaður.

Kostnaðurin at reka samfelagið Føroyar er blivin so tungur, at trupult verður at halda stand komandi árini.

Tað sær út til, at bøurin ikki er førir fyri at føða seyðin - okkara fiskigrunnar, okkara vinnulív okkara arbeiðandi fólk hevur trupult við at figgja vælferðarsamfelagið Føroyar og áhaldandi krøvini til trygdina og vælferðina.

Kanska fer "klippingarideolgiin" hjá Hermani Oskarssyni nú at bera ávøkst - time will show.

Nýggir vinnu- og inntøkumøguleikar eru ringir at fáa eyga á - hesir sum loysingarvongurin lovaði at koma við ístaðin fyri blokkniðurskurðin, sum higartil hevur kostað føroyinginum 2,5 milliardir í minni vælferð.

Sitandi samgonga hevur sett sær fyri at yvirtaka fyri 200-250 millónir og harvið leggja eina enn størri byrðu á fólkið, skil tað hvør í vil.

At leggja enn størri byrðar bæði á fólkið og vinnuna - ein sera vandamikil gongd má sigast.

Ásannast má, at vit veruliga eru komin í vandasjógv við hesi politisku samanseting.

Bíblian innblást av Gudi - ikki mannaorð um Gud

RICHARD DANIELSEN

24. partur

Næstur Jónasi profeti er Mika profetur. Mika livdi um somu tíð sum Esaias og Hoseas, t.v.s. í tí seinastu tíðini, áðrenn Ísraels ríki gekk til grundar. Helst hevur hann upplivað, at ríkið gekk til grundar, og fólkið fört í útlegd. Hann, sum hinir, sigur, at Harrin hevur talað til sín. Hann talar dóm yvir bæði ríkini bæði tað norðara og tað sunnara. Hann leggur ábyrdina fyri tað skeiva, sum gjørt verður, á høvuðstaðirnar báðar, Samaria og Jerúsalem. Hygg 1. kap. 5. vers. Hetta síggja vit eisini, tá ið vit lesa gjøgnum kongabøkurnar, tað vóru kongarnir, ið førdu fólkið av leið.

Tann fyrsti kongurin í norðara ríkinum, eftir at ríkið fór í tvíningar, Jeroboham at hann, fekk fólkið at dýrka tveir kálvar í staðin fyri tann stóra Gud Ísraels, sum hevði opinberað seg so kraftiga fyri hesum fólki. Og hvør var grundin fyri, at hann gjørdi hetta. Jú, hann var bangin fyri at missa valdið, um fólkið reisti suður til Jerúsalem at dýrka Harran. Hesir kálvar gjørdust ein snerra fyri fólkið.

Aftur og aftur lesa vit, at kongarnir sum komu eftir hann, hildu fast við syndirnar, sum Jeroboham hevði fingið Ísrael at gera. Eingin av kongunum í tí norðara ríkinum óttaðist Harran. Hetta var ein ræðulig synd, men eisini láturligt. Dýrka tveir kálvar. - 1. Kongab. 12,30 sigur, at fólkið fór líka til Dan at stíga fram fyri annan teirra. Men hetta menniskjauppfinnilsi varð blandað saman við gudsdyrkan. "Hetta eru gudar tínir, sum førdu teg út av Egypptalandi," segði hann við fólkið og gjørdi líknandi fyriskipanir, sum Móses hevði gjørt, við prestatænastu, ofringum, høgtíðum osf., men hann gjørdi hetta eftir sínum egna tykki.

Men er ikki soleiðis í dag eisini. Tað er ótrúligt, hvat átrúnaður, uppfunnin av menniskjum, kann fáa fólk at gera, eisini trúgvandi fólk. Tey hanga fast við láturligar traditiónir, blanda tær saman við sannleikan, so alt verður ein fløkja, sum skilir gudsbørn sundur. Men her á døgum Mika var komið upp undir endan, og Mika talar, sum hinir, um ræðuligan dóm, sum kemur vegna synd fólksins.

Hvussu er tað við dóminumið hongur yvir tær fyri tínar syndir? Er hann burtur við trúnni á Jesus Kristus, ella skumpar tú enn hendan spurningin um ævinleikan framman fyri tær og setur út. Tað er vandamikið. Í kapitli tvey hjá Mika talar profeturin júst um persónliga synd. Bíblian er so persónlig, tí hon er ætlað okkum øllum til frelsu, og vit lesa eisini, í hesum sama kapitli, at Harrin talar troystarorð til tann, sum ger rætt. Og tað fyrsta rætta sum vit eiga at gera, um vit ikki hava gjørt tað, er at taka ímóti Kristusi sum okkara frelsara og harvið fáa syndafyrigeving og ævigt lív.

Framhald

Ffestiniog

JÓN ÁSGRÍMUR ÁSGEIRSSON
Tórshavn

9. mai 2008 snúðu høvuðstíðindindi í "Degi og Viku" seg um SEV og ætlanirnar hjá sp/f Røkt at brúka vindorku at pumpa vatn niðan á byrgingarnar í Vestmanna.

Sambært SEV letur ætlanin sig ikki gera - hvørki tekniskt ella økonomiskt.

Hetta samsvarar illa við tað, sum eg lærdi í Menntaskólanum í Reykjavík fyri gott 30 árum síðani.

Í okkara lærubók (1) í fysikk bleiv elverkið í Ffestiniog í Wales brúkt sum dømi um, hvussu elorka verður "goymd". Hetta við at teir pumpa vatn 300 m niðan í eina byrging, tá elforbrúkið er lágt. Tá elnýtslan veksur, verða turbinurnar settar í gongd. Kapaciteturin er 360MW.

Elverkið í Ffestiniog bleiv tíkið í brúk í 1963, og meir kann lesast á www.fhc.co.uk/ffestiniog.htm

Tað er tí ikki rætt, tá ið SEV pástendur, at tað ikki ber til tekniskt.

Á nevndu heimasíðu er ein linkur til eitt annað verk - Dinorwig (www.fhc.co.uk/dinorwig.htm), sum koyrir eftir sama princippi.

Tað bleiv liðugt í 1984, og er 1.320 MW.

Hevði verkið í Ffestiniog ikki verið eitt "bæredygtigt projekt", hevði Dinorwig neyvan verið bygt.

Tað er tí heldur ikki rætt, tá SEV pástendur, at tað ikki ber til økonomiskt.

(1) Physics,concepts and models, eftir Wenham o.a., útgivin 1972, ISBN: 0201086085